# Ókeypis vanlukkutrygging til øll Føroya børn

**Soleiðis er tilboðið frá Tryggingarfelagnum Føroyar. Tilboðið er galdandi fyri øll, og tað er uttan treytir – men er bert galdandi hettar árið**

TRYGGING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Tað at tryggja tíni børn eigur at vera eins nátúrligt sum tað er at tryggja tær bilin ella húsini.

Tað sigur Mortan Poulsen, stjóri á Tryggingarfelagnum Føroyar, sum frá í dag og árið út bjóðar øllum brønum undir 18 ár, sum tekna barnavanlukkutrygging, ókeypis trygging fyrsta árið.

Mortan Poulsen sigur, at tað bara eru millum 10 og 15% av fólkinum, sum hava vanlukkutrygging, og tað halda tey á Tryggingarfelagnum Føroyar ikki vera serliga heppið.

– Nú hevur verið so nógv tosað um tær kollektivu vanlukkutryggingarnar av skúlabørnum, hvørt tað eru kommunurnar ella Mentamálaráðið, sum hevur ábrygdina av teimum. Hetta kjakið leggja vit okkum ikki út í, men eg vil bara vísa á, at tær kollektivu tryggingarnar bert eru minimumstryggingar, og tær eru bara gladandi á ávísum geografiskum øki.

– Tað sum vit bjóða er ein heiltíðarvanlukkutrygging, sum er galdandi allastaðni - bæði í Føroyum og uttanlands, sigur Mortan Poulsen.

Hóast ongar treytir eru um, at tryggingartakari skal hava allar sínar tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, so sigur Mortan Poulsen, at tey sjálvsagt rokna við at fáa fleiri kundar av einum slíkum tilboð.

Frá komandi ári at rokna fer Tryggingarfelagið Føroyar eisini at bjóða øllum nýføddum børnum slíkar tryggingar, sum tá ikki verða ókeypis.

Prísurin fyri eina vanlukkutrygging við upp til eina millión í útgjaldi fyri avlamni, er 1.000 krónur um árið. Um barnið gerst 100% avlamið, kann útgjaldið verða tvær milliónir krónur. Við deyða er gjaldið 17.000 sum ein jarðarferðarhjálp. Hetta er tí, at talan er um eina vanlukkutryggin, og tá er tað tørvurin hjá tí skadda, talan er um. Við deyða er eingin slíkur tørvur.

– Teir vanligastu skaðarnir eru tannskaðarnir, sigur Mortan Poulsen. Teir verða sjálvandi eisini umfataðir av slíkari trygging.

Mortan Poulsen sigur at enda, at Tryggingarfelagið Føroyar hevur boyrtt hugtakið fyri vanlukku í treytunum.

– Hetta merkir m. a., at tilburðir, har vanlukkur standast av, at tann tryggjaði svímar ella verður ússaligur, eisini verða endurgoldnar, sigur Mortan Poulsen.




*– Tað at trygggja okkara børn eigur at vera eins nátúrligt sum at tryggja húsini ella bilin, sigur Mortan Poulsen, stjóri á Tryggingarfelagnum Føroyar, bjóðar øllum Føroya børnum eina ókeypis heildarvanlukkutryggin fyri 2006*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Lega fyri yvirvektig børn á Skarvanesi

**Ì juli verður summarskeið fyri børn við vekttrupulleikum. Tiltakið er fyri 7-15 ára gomul børn og foreldur teirra. Børnini skulu hava so mikið av yvirvekt, at vandi er fyri heilsustøðu teirra**

*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Legan verður á Skarvanesi í tíðarskeiðinum 26 juni til 23 juli. Ætlanin er at bæði børn og vaksin skulu røra seg nógv. Gongutúrar runt Sandoynna, ríðing, svimjing og rógving stendur á skránni. Um veðrið verður vánaligt verður skipað fyri spæli í fimleikarhøllini ella í svimjihylinum á Meginskúlanum á Sandi.

Umframt nógva likamliga rørslu skullu bæði børn og foreldur luttaka í innkeypi og matgerð fyri at læra seg at velja og gera til sunnan kost.

Trý fakfólk verða við alt skeiðið. Ein útbúgvin kostvegleiðari stendur fyri matinnkeypti og matgerð. Barnafysioterapeutur stendur fyri likamligu venjingunum og barnasjúkrasystir hjálpur børninum við serligum tørvi á medisin ella øðrum.

Tað er Jólamerkjagrunnurin sum stendur fíggjarliga aftanfyri summarskeiði. Skeiði er ókeypis undantikið ferðing til og frá Skarvanes.

Pláss er fyri tíggju børnum og minst sjey børn skulu tekna seg fyri at skeiði skal verða hildi.

Treytirnar fyri at sleppa við á skeiði er at bæði børn og vaksin eru motiveraði og síggja yvirvektina sum ein álvarsligan vanda tey ynskja at gera nakað við.

Sodavatn, chips og góðgæti er ikki loyvt at taka við. Og royking er bannað innandura. Børn sleppa ikki at roykja.

Umsóknarblað fæst hjá kommunulækna ella heilsusystir.



*Nú sleppa Jógvan Soufs Vágshey og øll onnur, ið sita í koyristóli, ótarnað inn um dyrnar í Miðlahúsinum*

*Mynd: Jan Müller*

# Miðlahúsið fyri rørslutarnað

Í gjárkvøldið var fyrstu ferð at Jógvan Sofus Vágsheyg kundi koma inn gjøgnum høvuðsdyrnar í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Fyrr hevur hann verið noyddur at rulla inn gjøgnum bakdyrnar eftirsum umstøðurnar hava verði so vánaligar.

– Tað var ein útmerkað konsert og ein útmerkað inngongd, sigur Jógvan Sofus um kvøldið.

Ígjár vóru menn frá Tórshavnar kommunu uttanfyri og løgdu asfalt á, og áður hevur ein timburmaður gjørt eina rampu, so at gjørligt er at rulla inn.

Men tíanverri eru umstøðurnar ikki líka góðar allastaðni. Tá Jógvan Sofus og konan skuldu fara at taka sær eina øl aftan á konsertina á Hotel Hafnia bar ikki til.

Hóast lyfti um at tey hava eina rampu (sí grein á síðu 30-31) visti ongin á hotellinum um hetta, og tí vóru hjúnini noydd at fara til húsar aftur.

it.




MANNING TIL MÓTTØKUNA

Søkt verður eftir fólki til móttøkuna umborð á Norrönu

Smyril Line sóknast eftir fólki við royndum á høgum altjóða tænastustigi. Tað er krav, at umsøkjararnir duga væl danskt og enskt í skrift og talu og annars hava kunnleika til hini norðurlendsku málini umframt týskt ella onnur fremmandamál. Tað er ein treyt, at móttøkufólkini hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið.

Roknast skal við upplæring á skrivstovuni, áðrenn farið verður umborð

**Heilsuprógv fyri sjófólk krevst** (Ikki eldri enn 2 ár).

Tað er ein fyrimunur at hava trygdarskeið (Ikki eldri enn 5 ár).

Smyril Line bjóðar størv í einum umhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.

Umsóknir og CV skulu vera okkum í hendi innan 6. februar 2006 og skulu sendast til:

Smyril Line
Manningardeildin
Jónas Broncks gøta 37
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

Ella við telduposti til:
crew@smyril-line.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og í dag selja og marknaðarføra vit Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark um allan heimin.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Hanstholm, Bergen, Reykjavík, Kiel og í Lerwick. Agentar eru í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveits, Benelux, Fraklandi og Italia.

SMYRIL LINE · EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM